# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Høvuðsstaðurin á talentveiðu

Soleiðis ljóðar yvirskriftin í tíðindaskrivi frá Tórshavnar Kommunu, sum arbeiðir við eini stórari ætlan, ið skal skapa nýggj arbeiðspláss og fleiri skattakrónur og harvið styrkja trivnaðin og vælferðina í kommununi og landinum sum heild. Borgarstjórin fer til London at vera við í tiltaki fyri útisetar.

Spurningurin um at fáa føroyingar, ið fara av landinum at útbúgva seg, heimaftur er frammi við jøvnum millumbili. M.a. hevur Norðuratlantsbólkurin í Fólkatinginum við Tjóðveldi á odda gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa lýst hetta stóra mál, eitt nú í samstarvi við Tórshavnar Kommunu.

Og nú verður so enn ein kanning, hesaferð av føroyingum, sum lesa í Stórabretlandi, løgd fram. Niðurstøðurnar í flestu av kanningunum eru tær, at føroyskur ungdómur, sum fer av landinum at útbúgva seg, velur ofta ikki at koma heimaftur eftir lokna útbúgving. Orsøkirnar kunnu vera ymiskar, ein er at hevur tú fest røtur og fingið familju og arbeiði í øðrum landi, so hevur tú ilt við at leita heimaftur. Annað er so tað at møguleikarnir fyri at fáa arbeiði í Føroyum eftir lesturin eru avmarkaðir. Kanningarnar vísa tó eisini, at føroyingar undir útbúgving aðrastaðni vita ov lítið um, hvørjir vinnumøguleikar eru í Føroyum.

Hetta ynskir so landsins størsta kommuna at gera nakað við.

Kommunan ásannar, at nýggjar og globaliseraðar tíðir krevja nýggjar og globaliseraðar strategiir, og tí arbeiðir kommunan saman við vinnuni, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og vitanarstovnum miðvíst við at gera høvuðsstaðin enn meira dynamiskan, so hann gevur teimum, sum longu búgva her, góðar umstøður at arbeiða og stovna virksemi, samstundis sum hann megnar at draga talentini til sín uttan úr heimi.

Kommunan hevur sett sær fyri at kappast við útlendsku metropolarnar um at ta best útbúnu arbeiðsmegina og um talentini við teimum bestu royndunum og størstu drívmegini. Kommunan vil hava fatur á so nógvum borgarum, sum tilber, ið kunnu verða við til at menna nýtt vinnulív og skapa nýggj arbeiðspláss.

Vit kunnu bara fegnast um, at ein føroysk kommuna brúkar orku uppá slíkt mál og vónandi gevur tað úrslit, at borgarstjórin í landsins størstu kommunu nú fer til London at røða fyri lesandi føroyskum ungdómi har. Hóast hetta er ein gongd, sum krevur orku og tíð, so er gott, at spónurin verður sett í – at almennir myndugleikar í Føroyum eru varugir við tær avbjóðingar og vandar, sum lúra, fer henda gongd at halda fram, at støðugt færri útbúnir føroyingar koma heimaftur. Hinvegin er tað eisini ein sannroynd, at tað gott at fáa royndir at arbeiða í útlandinum og kunna koma heimaftur við hesum royndum. Hinvegin er hetta ikki bara so einfalt, tí nógv, sum gera av at fáa sær familju og arbeiði í útlandinum, gerast so fastgrógvin í nýggja heimlandinum, at tey hava ilt við at venda heimaftur.

Hvat og hvussu enn hendir, so er grundarlagið undir øllum, at vit framhaldandi menna hesar oyggjar og skapa vøkstur, soleiðis at tað er pláss fyri útbúnum føroyingum at koma heimaftur. Her mugu vinnulív og myndugleikar ganga hond í hond.

**Sosialurin**

## Bók um mannarættindasáttmálar

*Tíðindaskriv*

24. oktober, altjóða ST dagin, kemur bók út um ST og mannarættindasáttmálar. Bókin viðger mannarættindi úr mentanarligum, sosialum, búskaparligum, politiskum og løgfrøðiligum sjónarhornum. Bókin er tann fyrsta av sínum slagi á føroyskum, og kann hon tí verða eitt týdningarmikið íkast til føroyska kjakið um mannarættindi framyvir. Greinirnar eru skrivaðar av føroyskum serfrøðingum, ið hava fakligar og praktiskar royndir í altjóða mannarættindaspurningum. Heldur enn at týða útlendska bókaútgávu hevur Amnesty International Føroya deild valt at skapa eitt sjálvstøðugt verk, ið hóskar til føroyskar lesarar og føroysk samfelagsviðurskifti anno 2009.

Átta kapitlar eru í bókini, og teir taka lesaran á ferð ígjøgnum ST-stovnin og útvaldar mannarættindasáttmálar.

Bókin er serliga ætlað teimum, ið eru á hægsta stigi í miðnámsskúlum og á byrjanarstigi á hægri lærustovnum. Eisini er bókin væl egnað sum bakgrundslesnaður hjá fjølmiðlum og starvsfólki í umsitingini, ið starvast við mannarættindum.

Greinasavnið er harumframt kærkomið hjá øllum, ið vilja ogna sær størri og neyvari innlit um altjóða mannarættindaviðurskifti. Bókin verður útgivin á forlagnum Fróðskapi.

Høvi verður hjá fólki at síggja bókina á tiltakinum, sum Javnstøðunevndini og Demokratia skipa fyri, um CEDAW, sum er kvinnusáttmálin, í Norðurlandahúsinum ST dagin leygardagin 24. Oktober.

***Amnesty International Føroya deild***




## Sandoyggin

PALLI DALSGAARD



Lítið man verða at ivast í, nú kommunurnar skulu leggjast saman til størri eindir, og ivamál eru um, hvat skal gerast við Sandoynna, at leggja saman við Havnini hevði verið frægasta loysnin.

Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, var ógvuliga positivur í sínum úttalilsi, og teir fyrimunir, hann nevndi, vigaðu nógv.

Tunlamálið hevði í øllum føri verið munandi nærri. Men meiningarnar her suðurifrá vóru bedrøviligar. Onkur vildi hava ein yvirborgarstjóra, ein annan vildi ráa sær sjálvum, ein triði vildi samanlegging fyrst. Tað ljóðaði sum, at alt var betri enn at koma undir Havnina, sum avgjørt hevði verið einasta og frægasta loysnin.

Vit her suðuri eru tíverri bert samd um eitt einasta, og tað er, at vera ósamdir um alt.

Gerhard Lognberg var við uppá at leggja saman við Havnini, og hann hevur eisini verið í bløðunum við sama evni.

Sjálvur hevði eg eitt lesarabræv í bløðunum í mars mánaði 2005 um at leggja saman við Havnini.

Vit eru so bangin fyri at missa einki.

## Veður og veðurlag

KRISTIN POULSEN

Havi væntað, at onkur fór at gera viðmerkingar til tey nýggju veðurtíðindini hjá sjónvarpinum, men so er ikki, og tí henda viðmerkingin.

Veður og veðurlag er ikki tað sama. Veðurlag er tað, danir nevna klima, og at tosa um veðurlag um nakrar dagar er púra burturvið. Tá ið vit tosa um tað føroyska veðurlagið, so hugsa vit sum oftast um, hvussu veðrið háttar sær í eitt langt tíðarskeið, t. d. í eitt ár. Útvarpið nýtir orðið veðurvánir, og hví ikki nýta tað. Annars haldi eg, at veðurtíðindini í sjónvarpinum eru ógvuliga fløksjaslig og óneyðuga drúgv.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.